| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 31. mai 2018 |
| Býráðsfundur nr. | 06/2018 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2018 tann 31. mai mars kl. 19.00 varð býráðsfundur hildin í ovara sali í Mentanarhúsinum móti bátahavnini, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 25. mai 2018 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Eivin Breiðaskarð
Kristian Petersen
Ólavur Larsen
Árant Berjastein
Magni Herason Jøkladal
Sigurð S. Simonsen
Eyðun á Lakjuni
Edva Jacobsen

Árant Berjastein hevur boðað frá, at hann kom á fund, so skjótt sum hann er afturkomin uttanlendis í kvøld. Staðfest varð, at hann ikki møtti, og varð sostatt ikki við í viðgerðum og avgerðum av málunum á dagskránni.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, kommunustjóri

**Mál nr. 16/2018.**

***1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlanarkarm fyri kommununa 2019.***

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 17. mai 2018 til fyribils fíggjarætlanarkarm fyri kommununa fyri 2019 sum í fyrstu atløgu bert umfatar fíggjarligar karmar fyri nevnda fíggjarár.

Vísandi til § 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 01. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 01. desember.

Skattagrundarlagið fyri 2019 er ikki roknað út frá upplýsningum frá Taks, við tað at upplýsningar um framroknaðar skattainntøkur enn ikki eru innkomnir, men er grundarlagið tí sama sum við uppskotinum til 1. viðgerð fyri 2018 frá 28. september 2017.

Metta skattskylduga inntøkan hjá kommununi verður sambært yvirlitinum kr. 323.659.879,00 og botnfrádrátturin til kr. 34.440.212,00, so bruttoskatturin við 21,5%-um verður mettur til kr. 62.182.228,00. Fyrisitingin hevur ikki framroknað A+B skattin grundað á staðfestingar fyri fyrstu 4 mánaðarnar, sum farnir eru av 2018.

Barnatalið er 389, og barnafrádrátturin er ásettur til til kr. 6.500,00 pr. barn í 2019, sum er sama upphædd sum fyri 2018, og verður hesin mettur til kr. 2.528.500,00, so metti A+B skatturin eftir henda frádrátt verður kr. 59.653.728,00.

Henda upphæddin verður helst nakað niðanfyri framrokningarnar av A+B skattinum fyri 2018, havandi í huga, at kommunan fyri fyrstu 4 mánaðarnar hevur fingið kr. 2,1 mió meira í kommunuskatti, og at vanliga liggja seinastu 4 mánaðarnir av árinum væl omanfyri metingina. Tó vísa avrokningarnar av A+B skatti frá mei mánaða 2017 til árslok 2017 eina meirinntøku millum 0,1% og 20,6%.

Tó verður mælt til at vísa fíggjarligt varsemi bæði við inntøku- og útreiðslumetingum, við tað at kommunan neyvan kemur at hava so gott fíggjarligt roknskaparár í 2019 sum fyri 2017, somuleiðis neyvan fyri fíggjarárið 2018.

Hjálagda uppskot, sum fíggjarnevndin hevur viðgjørt á fundi 23. mai 2018 og har ongar broytingar eru gjørdar í mun til uppskotið frá fyrisitingini javnvigar við kr. 119.887.745,00, somuleiðis sum

roknað verður við einum rakstraravlopi upp á kr. 7.029.327,00, so nettojavnvágin er kr. 112.858.348,00.

Bert ein avseting er gjørd til íløgur upp á kr. 29,6 mió, og tað er íløga í nýggjan barnaskúla í Fuglafirði, hetta sambært avgerð hjá býráðnum um byggileist 2016-2020 upp á kr. 104,0 mió tilsamans. Sambært uppskotinum til karmar verða bert rúm fyri kr. 7.029.327,00 til aðrar íløgur í kommununa.

Rakstrarútreiðslurnar brutto verða mettar til kr. 73.758.348,00 og netto til kr. 54.581.331,00, rentuútreiðslurnar + rentustuðulin til kr. 3,0 mió og avdráttirnir av føstum lánum til kr. 6.5 mió. Í sambandi við øktu avdráttirnar av lánum er møguleiki fyri at tosa við lánstovnar og at fáa lækkað avdráttirnar nakað, so størri rúm er fyri øðrum íløgum yvir raksturin.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 59.653.728,00 við einum skattaprosenti upp á 21,5%, partafelagsskatturin verður fyribils verður til kr. 11,0 mió og inntøkur frá tí almenna fyri eldraøkið til kr. 13,4 mió, meðan eingin inntrøka fyribils er avsett við sølu av grundstykkjum. Møguligar inntøkur verða inntøkuførdar undir íløgum teknisk mál øki 6.

Staðfest er, at inntøkurnar úr landskassanum til eldraøkið hava verið kr. 658.000,00 minni í 2018 enn í 2017, við tað at tíðaravmarkaða játtanin, sum býtt varð út eyka til kommunur er fallin burtur í 2017, men hinvegin verður mett, at inntøkan úr landskassanum fyri 2019 verður áleið sama sum fyri 2018.

Annars hevur býráðið tikið avgerð um at lána kr. 55,0 mió frá 2017-2020 til kommunalar íløgur, harav kr. 16,7 mió skulu verða upptiknar í 2019. Hinvegin varð mett, at lánsupphæddin skuldi verða kr. 49,2 mió, men henda hækkað við kr. 5,8 mió, somuleiðis sum staðfest er, at metti byggikostnaðurin av nýggja barnaskúlanum er hækkaður við kr. 3,0 mió úr kr. 101,0 mió upp í kr. 104,0 mió, grundað á innrættingina av skúlastovunum vm. í gamka FK bygninginum.

Tó er eingin avgerð tikin um, hvat FK bygningurin skal verða nýttur til, eftir at nýggi barnaskúlin verður tikin í nýtslu.

Fíggjarnevndin samtykt á fundi 23. mai 2018 at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarkarm fyri býráðið til 1. viðgerð.

Eftir 1. viðgerðina í býráðnum verður fíggjarætlanaruppskotið viðgjørt og gjøgnumarbeitt í føstu nevndunum í samráð við stovnsleiðarar og ábyrgdarfólk.

Somuleiðis verður víst til skriv, sum fíggjarnevndin tann 24. januar 2018 hevur sent føstu nevndunum og deildarleiðarunum um byrjaranararbeiði við fíggjarætlanini fyri teirra málsøki fyri 2019.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið aftur í fíggjarnevndina til víðari viðgerðar. (8-0).

**Mál nr. 17/2018.**

**Fyrsta viðgerð av eykajáttan til rakstur og íløgur í Vesturstovu.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá sosialu nevndini, dagfest 15. mai 2018, har greitt verður frá, at nevndin hevur lagt til merkis, at fíggjarætlanin fyri Vesturstovu longu nú er yvirtrekt, og hevur biðið um frágreiðing um nevndu viðurskifti.

Samanumtikið hevur Vesturstova nýtt fleiri pengar enn avsettir eru á fíggjarætlan kommununar fyri inniverandi fíggjarár.

Hetta er grundað á, at tekniska deildin væntaði at nýta peningin, sum avsettur varð til íløgur í Vesturstovu kr. 700.000,00 í 2017 + eina eykajáttan frá býráðnum tann 6. juni 2017 upp á kr. 450.000,00 ella tilsamans kr. 1.150.000,00. Av hesi orsøk varð ikki heitt á býráðið um fígging til íløgur í Vesturstovu fyri 2018, við tað at mett varð, at arbeiðið varð liðugt ultimo desember 2017.

Tað var sera torført at fáa fólk at gera arbeiðið, og tekniska deildin metti hóast alt, at íløgan varð gjørd liðug í 2017 samsvarandi játtanini, men soleiðis kom tó ikki at verða tíverri.

Hanus Hansen, timburmaður hevur gjørt timburarbeiðið, sum inniber, at eitt dupultkamar í kjallarahæddini er gjørt til 2 einkultkømur við egnum WC og brúsu. Hetta varð hart tiltrongt, og vórðu búfólk flutt inn í hesi mánaðarskifti mars/apríl 2018.

Eisini varð málaraarbeiði gjørt í gongini í kjallaranum, so alt sær meira liðugt og fínt út. Arbeiðið er væl úr hondum greitt, men rokningar eru fleiri staðfestar í 2018, sum um alt gekk sum ætlað vórðu bókaðar inn á fíggjarárið 2017.

Á Vesturstovu konto 260 eru avsettar kr. 130.000,00 fyri 2018, men nýttar eru higartil kr. 193.449,00.

Á Vesturtsovu íløga konto 265 eru, sum lýst omanfyri eingin játtan avsett í 2018, og nýttar eru higartil í inniverandi fíggjarári kr. 145.924,00. Nógv av arbeiðinum er tessvegna gjørt liðugt í 2018, og býarverkfrøðingurin hevur upplýst, at neyðugt varð at halda fram við arbeiðinum í 2018 og gera tað liðugt.

Sosiala nevndin mælir einmælt til at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 94.000,00, sum eru brúktar ov nógv á rakstrarstaði 260 kontur 1651-00 og 1652-00 + kr. 40.000,00, so nakað meir av viðlíkahaldi kann verða gjørt á Vesturstovu í summar.

Tilsamans verður biðið um eykajáttan til rakstur av Vesturstovu upp á kr. 134.000,00.

Á konto rakstrarstaði 265 konto 3131-00 "Íløga í Vesturstovu" er játtanin sambært fíggjarætlanina fyri 2018 kr. 146.000,00, sum eru nýttar til viðuggerð av kjallaranum á Vesturstovu, sí frágreiðing frammanfyri.

Sostatt er talan um eina áheitan á fíggjarnevndina um eina samlaða eykajáttan til rakstur og íløgur í Vesturstovu upp á tilsamans kr. 280.000,00.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 23. mai 2018, og mælir nevndin býáðnum til at ganga áheitanini frá sosialu nevndini á møti og veita eina samlaða eykajáttan upp á kr. 280.000,00 til íløgur og rakstur í Vesturstovu, rakstrarstøð 265 og 260. Útgreinað soleiðis, at kr. 146.000,00 verða játtaðar til íløgur og kr. 134.000,00 til rakstur.

Staðfest er, at eingin játttan er tøk til "íløgur í Vesturstovu" rakstrarstað 265 konto 3131-00 á fíggjarætlan kommununar fyri 2018, og tí verður neyðugt við eini eykajáttan, soleiðis at peningurin kann verða játtaður, so karmurin í íløgum í øki 2 kann verða yvirhildin.

Somuleiðis er eisini staðfest, at á rakstrarstaði 260 konto 1651-00 og 1652-00 "Viðlíkahald vm." eru nýttar kr. 134.000,00 móti eini avseting upp á kr. 40.000,00. Sostatt er staðfest eina meirnýtslu upp á kr. 94.000,00, og um játtan verður givin eyka til kr. 40.000,00, so verður játtanin á hesum konti tilsamans kr. 134.000,00.

Sostatt verður rakstrarstað 260 hækkað við kr. 134.000,00 úr kr. 130.000,00 upp í kr. 264.000,00.

Nevndin viðgjørdi hesi viðurskifti á fundinum, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina samlaða eykajáttan upp á kr. 280.000,00 til rakstrarstað 265 konto 3131-00 "Íløgur í Vesturstovu" kr. 146.000,00 og kr. 134.000,00 til rakstrarstað 260 kontoir 1651-00 og 1652-00 kr. 146.000,00.

Sosatt hækkar játtanin á rakstrarstaði 265 "íløgur í Vesturstovu" á øki 2 úr kr. 0,00 upp í kr. 146.000,00, eins og játtanin á rakstrarstaði 260 fer úr kr. 130.000,00 upp í kr. 264.000,00. Somuleiðis samlaðu útreiðslurnar til íløgur á øki 2 "Almanna- og heilsumál" verða øktar við nevndu upphæddum.

Vísandi til § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, so verður útreiðslan fíggjað av innistandandi peningi, sum kemur frá staðfestur rakstraravlopi, sum eitt nú kemur av meirinntøkum av A+B skatti, partafelagsskatti vm. fyri roknskaparárið 2017.

Í hesum sambandi verður somuleiðis eisini víst til § 41, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum.

Ein eykajáttan sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2018, grundað á at talan ikki um umflyting millum rakstrarøki og rakstrarstøð, men ein íløguútreiðsla, sum fíggjað er beinleiðis av gjaldføri kommununa.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, og við hvørja eykajáttan skal verðá víst á, hvussu hon skal verða fíggjað.

Samtykt eykajáttan skal verða kunnað landsstýsismanninum í fíggjarmálum innan 3 gerandisdagar aftaná, at henda eru samtykt við 2. viðgerð, hetta vísandi til § 53, stk. 2 3) í oman fyri nevndu lóg.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælunum frá sosialu nevndini og fíggjarnevndini um eykajáttan til íløgur og rakstur í Vesturstovu upp á kr. 280.000,00 og beina málið til aðru og endaliga viðgerð/avgerð á komandi býráðsfunsi. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.05.

Eivin Breiðsskarð

Kristian Petersen

Magni Herason Jøkladal

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Sigurð S. Simonsen

Edva Jacobsen

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen